## DAGSINS MEINING

# Heimsins blinda eyga

Mánakvøldið hevði SvF eina av sínum heilt góðu og álvarsomu sendingum. Vit hugsa sjálvandi um sendingina um støðuna í landspartinum Darfur sunnalaga í Sudan. Í hesum landsparti hevur verið borgarakríggj í 20 ár. Her búgva tvær tjóðir. Tann eina er svarta upprunafólkið, ið fyri stóran part er kristið fólk. Hin tjóðin er arabisk og muslimsk. Tey seinastu tjúgu árini hevur stjórnin í Karthoum kúgað tjóðina fyri sunnan við miklum harðskapi.

Tað, sum er farið og framvegis fer fram í Darfur, er einki annað enn beinleiðis fólkamorð, genocide. Stjórnin fremur etniska reinskan á sama hátt, sum heimurin sá tað undir nazismuni, stalinismuni og á Balkan. Vit kundu lagt afturat, at tað sum teir europæisku landnámsmenninir gjørdu í Norður- og suðurameriku á mangan hátt tíverri eisini minnir um fólkamorð. Sama kann við ávísum rætti verða sagt um afrikanska trælahandilin í 16-1800 talinum, har milliónir av afrikanarum vórðu rændir og fluttir til Afarika, har tey vórðu seld sum trælir á uppboðsølum víða hvar.

Hvat er tað, sum heilt ítøkiliga hendir í Darfur? Tað hendir hetta, at ein milits, ið nevnist Janjaweed við stuðli frá landsstjórinin i í Karthoum herjar allan landspartin við báli og brandi. Lopið verður á bygdir, hús og smáttur verða brend, kvinnur verða neyðtiknar, børn og menn verða dripin. Tey, sum ikki doyggja av yvirgangsvirksemi Janjaweeds doyggja í hunri, tí tað er vorðið at kalla ógjørligt at dyrka jørðina og at hava kríatúr orsakað av stríðshendingunum. 10.000 fólk doyggja í hungri um mánaðin. Tey flestu teirra børn!

ST og Afrikanska samgongan hava higartil roynt at fáa skapt frið millum partarnar og at veita neyðhjálp. Men hesi tiltøk hava bert verið viðfáningar. Tiltøkini hava so at siga ikki gjørt mun. Heimurin hevur sum so mangan, tá talan er um Afrika, vent blinda eyga til teir ræðuleikar, sum fara fram í landspartinum Darfur. Hví hetta artgerðarloysið og hví henda líkasæla? Tað hevur nakað at gera við, at Darfur hevur ongan politiskan týdning. Hartil kemur, at vesturheimuirn ikki hevur nakran serstakan hug at leggja seg meira út við muslimska heimin, enn longu er gjørt. Skal eina munagóð humaniter hjálparskipan setast í verk í Darfur, so krevur hetta eina sterka hernaðarliga medvirkan til tess at verja hjálparfólkini. Hesa hernaðarligu uppgávu vil eingin átaka sær. Her er eitt eiti av eini herdeild frá Afrikansku samgonguni, sum als ongar heimildir hevur. ST stendur máttleyst, tí eingin tykist at hava áhuga fyri at hjálpa fólkinum í Darfur. Nøkur heilt fá lond t.d. Noreg hava hoyrt neyðarrópini úr Darfur og hava roynt at rópa heimin upp, men alt til fánýtis. Heimurin vendir neyðarrópunum deyva oyrað og heimurin vendir neyðini hitt blinda eyga. Hvussu leingi skal hesin sorgarleikur halda fram, mugu vit spyrja eftir sendingina mánakvældið i SvF?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er Norðoyri partur av Klaksvíkar Kommunu?

**Dánjal Jákup Meinertsson**
*Norðoyri*

Nakrar viðmerkingar undan býráðsfundinum, 30 november 2004.

Ein stóran part av hesari býráðssetuni, hava íbúgvar úti á Oyri roynt at fingið Klaksvíkar Kommunu at viðurkenna, at Norðoyri er ein partur av kommununi. Úrslitið hevur verið misjavnt.

Á fundi 16 oktober 2002, millum íbúgvar úti á Oyri, og Steinbjørn Jacobsen og John Færø fyri Klaksvíkar Kommunu, vóru hesi mál umrødd

1. **Skúlabarna-koyring:** hóast barnatalið var komið uppá 21, so vóru børnini framvegis koyrd í einum bili sum tekur 7 ferðandi. Morguntúrarnir vóru teir tyngstu, har kom tað javnan fyri at 14 børn vóru í bilinum, 2 í hvørjum setri — og trygdarbelti. Avtala varð at kommunan skuldi finna eina loysn á hesum.
2. **Spælipláss á Norðoyri:** Møguleiki fyri at íbúgvarnir sjálvir gera arbeiðið, og kommunan letur øki og tilfar. Umsitingin skal kanna møguleikarnar.
3. **Býarhegn:** Hóast langa málsviðgerð er onki komi burturúr og eingin veit naka um hvar málið liggur.
4. **Vatnveiting á Norðoyri:** Norðoyri hevur framvegis ikki sóttreinsa vatn, og ymiskar umberðingar eru fyri hví so er.
5. **Gøtusóparin út á Oyrar:** Ynski um at gøtusóparin koyrir regluliga út á Oyrar, serliga tí at onki býarhegn er, og skarn frá seyði og hestum liggur og rekst allastaðni. Borgarstjórin skal bera boðini víðari. Sera einfalt.

Tvey av hesum málum eru í dag loyst, soleiðis at fólk á Norðoyri eru nøgd. Men tey vórðu ikki loyst uttan svørðslag.

Trupulleikin við ovurfylta skúlabilinum varð loystur eftir hálvtannað ár við sjabbi aftur og fram og til seinast við hóttanum um at melda málið til løgregluna.

Trupulleikin við vatnveitingini varð loystur á sama hátt, eftir at Heilsufrøðiliga Starvsstovan setti fram krav um hetta, tí stórar nøgdir av koliformum bakterium vóru í vatninum. Krav var sett til kommununa um at ávara íbúgvarnar, men ávaringin kom ongantíð. Harafturímóti hava einstakir býráðslimir brúkt hetta ímóti okkum, at vit hava fingið reint vatn, sum um hetta var ein heiðursgáva, heldur enn eini sjálvsøgd rættindi.

Sum tað sær út í løtuni, kunnu børnini úti á Oyri skjóta ein langan hvítan pinn eftir spæliplássinum. Tey brúka vegin til at spæla bólt á. Tann sama vegin sum ungir klaksvíkingar brúka til kappkoyring.

Trý býráðsval á rað hava valevni lova okkum býarhegn. Úrslitið er syndarligt. Meg lysti at vita hvat ger hesa bygdina so serliga, at tað ikki ber til at vetrarfriða hana. Tað ber til alla aðrastaðni. Hetta er ein spurningur um at virða rættin hjá øllum pørtunum í hesum málið. Ikki bara rættin hjá teimum sum eiða seyðin og hava rættin til bøin, men eisini teimum sum búgva úti á Oyri og ikki fáast við seyðahald. Nú ár 2004 fer at halla, má tað bera til at ganga millum húsini uttan at vaða í seyðalorti. Eg havi hoyrt at kommunan fekk í boði at vetrarfriða bygdina afturfyri eitt endurgjald uppá 300.000 kr. men tók ikki av. Kann tað passa?

At senda gøtusóparabilin út á Oyrar regluliga, átti ikki at verið eitt trupult mál. Sambart fundarreferatinum 21. oktober 2002, skuldi borgarstjórin syrgja fyri hesum. Onki hendi hóast fleiri áminningar. 26 september 2003, kemur nýtt skriv frá býráðsskrivaranum, har hann staðfestir at alt er komi í rættlag og gøtusóparin kemur út á Oyrar einferð um vikuna. 9 oktober kemur so eitt bræv frá borgarstjóranum har hann staðfestir tað sama. Eg skal hervið boða frá, at nú, ultimo november 2004, er framvegis onki hent hesum viðvíkjandi. Fyrigevið mær, um eg ikki longur havi álit á borgarstjóranum.

Í hesum sama skrivið, dagfest 9 oktober 2003, nertir borgarstjórin við eitt annað mál, sum vit hava stríðst við. Oyravegurin er sera myrkur í støðum og nógv fólk gongur har. Viðhvørt er eisini seyður og onkuntíð hestar á vegnum. Tað hevði tí verið ein sigur fyri ferðslutrygdina, og fyri øll tey sum dagliga fáa sína motión á oyravegnum, um ljóssteyrar vóru settir upp har. Fundamentini standa í gongubreytini og kaðalar eru lagdir, so eftir er bara at seta steyrarnar upp. Ongin játtan var til hetta í 2003, ongin í 2004, og nú er líkt til at heldur ongin verður í 2005.

Synd er at siga at fráfarandi býráð hevur víst Oyrabygd stóran áhuga. Mín vón er at nýggja býráðið fer at taka sær aðrar partar fyri.

Um Oyrafólk skuldu reist ein minnisvarða yvir fráfarandi býráð, skuldi hesin verið bygdur av brotnum lyftum, líkasælu og kanska einum sindri av hástórari niðurgering.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





